## út at koyra

# BMW og 007

Týska BMW bilverksmiðjan mátti gjalda 70 milliónir krónur fyri at fáa BMW Z8 sportbilin við í nýggjasta James Bond filmin, saman við Agent 007.

**Kelda: Samvirke**

# Seat er ogn hjá VW

VW eigur sponsku Seat bilverksmiðjuna, sum í mong ár gjørdi Fiat bilar uppá licens.

Nú hava teir plattform og komponentsamarbeiði við VW, Audi og Skoda, og teir framleiða MPV bilin, Seat Alhambra, saman við Ford Galaxy og VW Sharan.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**

# Ford í Norra fær danskan stjóra

1. apríl tekur tann 37 ára gamli Carsten Færge, ið er dani, við sum stjóri fyri Ford Motor Norge. Eftir at hava arbeitt sum sølustjóri hjá Chrysler Europe í Bruxelles í góð 2 ár, hevur hann verið sølustjóri hjá Ford í Danmark teir seinastu 10 mánaðirnar.

**Kelda: Ford Motor Co. A/S**

# Saab avdúkar nýggjan orkusparandi motor

MAGNUS GUNNARSSON

Á bilaframsýningini í Geneve, sum byrjaði 29 februar, avdúkar Saab ein heilt nýggjan motor, SVC (Saab Varialble Compression), sum veruliga betrar bensinnýtsluna uttan at motorkraftin verður verri av tí teirri orsøk. Samanborið við vanligar motorar brúkar SVC motorurin væl minni bensin.

Motorverkfrøðingarnir hjá Saab hava ment SVC motorin, sum hevur eina nýggja skipan, ið varierar kompressiónslutfallið, og ger at bensinnýtslan verður minni, uttan at tað gongur út yvir kraftina á motorinum. Samstundis verður møguleiki fyri at brúka ymiskt brennievni av ymiskari góðsku.

Tann sannroynd at kompressiónslutfallið nú kann broytast, gevur nógv betur møguleikar fyri at stýra virkninginum og bensinnýtsluni meira neyvt.

***Kelda: Saab Danmark A/S***




# Renault við nýggjum motori




MAGNUS GUNNARSSON

Tann nýggi IDE (Injection Directe Essence) motorurin hjá Renault er fyrsti bensinmotorur við beinleiðis innspræning, sum er teknaður í Europa. Renault Coupé og Cabriolet eru teir fyrstu, sum fáa hendan nýggja 2.0 motorin við 16 ventilum, har bensin verður sprænt beinleiðis inn í sylindaran.

Við hesum IDE motorinum kemur Renault við nýggjari tøkni, har skipanin við at útstoytsgassið verður brúkt aftur, er viðvirkandi til minni bensinnýtslu og reinari forbrenning.

Beinleiðis innspræning av brennievninum er brúkt við sera góðum úrsliti í dieselmotorum. Arbeiðsgongdin er tann, at bensinið verður sprænt beinleiðis inn í forbrenningskamari við høgum trýsti við tí úrsliti, at kraftin verður betri og dálkingin minni.

***Volvo Personvogne Danmark A/S***

*Renault hevur gjørt fyrsta bensinmotorin við beinleiðis innspræning*

# Væl útgjørdur Kia Clarus

D.B.Bilar fekk í síðstu viku nýggjastu útgávuna av Kia Clarus sedan.

Bilurin hevur 2.0 l motor, 16 ventilar og 133 hk, og er sera vælútgjørdur.




*Soleiðis sær tann nýggi Kia Claurs út. Hann er júst komin til landið*



## út at koyra




# Nissan Primera, ein prima vælgjørdur bilur

MAGNUS GUNNARSSON

Hesin nýggi Nissan Primera er tann triðji í røðini, síðan Primera avloysti Nissan Bluebird í 1991.

Tað merkist á bilinum, at hann er sera væl gjørdur við góðum koyrieginleikum og umfatandi útgerð. Primera hevur vunnið sær sess ímillum teir bestu, tá umræður at vera álítandi og bíligur í rakstri.

### Nógvar trygdarskipanir

Nýggi Nissan Primera hevur verið gjøgnum so nógvar broytingar, at hetta í roynd og veru er ein nýggjur bilur, sum kortini líkist sær sjálvum. Uttan eru størstu broytingarnar framman og aftan. Innan eru eisini fleiri broytingar.

Nissan Primera hevur nógvar trygdarskipanir. Primera hevur eina ASC-skipan (Aktive Safety Chassic). Hendan skipan ger, at bilurin er tryggur í svingum, og dekkini hava gott vegtak undir øllum umstøðum.

Primera hevur ABS bremsur og EBD (Electronic Brake force Distribution), sum ansar eftir hvørjum hjóli sær. Eisini hevur bilurin eina mekaniska bremsuhjálparskipan (NBA), sum hjálpir til tá neyðugt er at bremsa hart.

Baklúkan verður latin upp uppeftir og framyvir, so ongin vandi er fyri at sláa høvdið í lúkuna, og hongslini eru av tí nýggja slagnum, sum ikki skaðar viðføri, tá lúkan verður latin aftur.

### Automatiski CVT gearkassin, ein uppliving at koyra

Motorurin er ein 2.0 við 16 ventilum og 140 hk, er ljóðleysur og hevur yvirskot av kraft. Primera fæst við einum trinleysum automatiskum gearkassa CVT ( Continously Variable Transmission), har tað ikki merkist at bilurin skiftur gear.

Hetta er fyrstu ferð at ein bilur í miðalklassanum, við somikið stórum motori er útgjørdur við hesum gearkassanum.

Hesin gearkassin má roynast, fyri at skilja frá hvussu hann virkar.

Snúningarnir á motorinum broytast ikki meðan ferðin økist, sum á bilum við vanligum automatiskum gearkassum.

### Tríggjar útgávur

Bilurin fæst í trimum útgávum: Comfort, Sport og Elegance. Standard útgerð í øllum útgávunum er t.d. ABS bremsur við EBD og NBA, hátrýstspularar til forlyktirnar, servostýring, tokulyktir framman og aftan, dupult airbag framman, airbag í síðunum, nakkapútur á øllum setrunum, startsperru, sentrallás, dupultvirkandi pollenfiltur, stereo radio við 6 hátalarum.

Sport útgávan hevur eitt nú Xenon forlyktir, sum geva sera gott ljós. Elegance útgávan er tann fínasti við træpanelum á gardanboksini, blankum kølagittari og blankum hurðahandtøkum. Primera fæst eisini við 5 hurðum og sum stationvognur.

# Nissan Primera

| | | |
|---|---|---|
| **Motorurin:** | 2.0 l 4 syl. 16 ventilar 140 h.k. | |
| **0-100 km/t:** | man. gear | 9,6 sek |
| | aut. gear | 11,5 sek |
| **Trekk:** | Framman | |
| **Dekkstødd:** | Comfort/Elagance: | 195/60-15 |
| | Sport: | 205/50-16 |
| **Bremsur:** | Skivur framman og aftan | |
| **Stødd og vekt:** | | |
| Longd: | | 452,2 cm |
| Breidd: | | 171,5 cm |
| Hædd: | | 141,0 cm |
| Viðførisrúm: | | 490 litrar |
| **Bensinnýtsla:** | man. gear | 12,3 km/l |
| | aut. gear | 11,8 km/l |

**Prísur:**

| | | |
|---|---|---|
| 1.8 l | Comfort við 4 hurðum | kr 175000,- |
| 2.0 l | Elegance við 4 hurðum | kr. 198000,- |
| 2.0 l | Sport við 4 hurðum | kr. 210000,- |

**Søluumboð:** ***P/F Meinhardt Arge***
***Tjaldursvegur***
***FO-110 Tórshavn***



